TIL NÆMINGAR Í FRAMHALDSDEILDINI

# AT SKRIVA STÍL



ODDFRÍÐUR MARNI RASMUSSEN HEVUR SKRIVAÐ

# At skriva stíl

**Oddfríður Marni Rasmussen**
**hevur skrivað**

*Stílur, ella framseting, sum tað eisini eitur, kann býtast sundur í tvey høvuðsrák. Eitt vísindaligt rák og eitt persónligt rák. Ofta verða hesi bæði flættað saman, so at tað, sum skrivað verður, sveiggjar millum tað alment upplýsandi og tað persónliga og subjektiva.*
*Stílur eitur á fronskum essay, og merkir tað: **ein roynd**.*



# At skriva stíl

### Hetta er tú!

**Rithøvundurin:** er ein, sum leggur til rættis evnið, sum hann skal viðgera og skriva um. Tað er ein, sum setir orðini saman soleiðis, at tey mynda eina meining, sum rithøvundurin kann góðtaka sum sína. Rithøvundurin er ein, sum ger bygnaðin greiðan. Ger ein bygnað, sum hevur eina byrjan, eina miðju og ein enda. Lutfallið kundi líkst einum fiskabeini: Høvdið er inngangurin, kroppurin er parturin, har evnið verður viðgjørt og grundgivið fyri, og sporlið er útgangurin.

**Rættlesarin:** er ein, sum lesur tekstin aftur, sum rithøvundurin hevur skrivað. Tað er hann, sum rættar stavivillur, teknvillur, skiftir orð út við onnur, sum honum dámar betur, strikar setningar, sum ikki hanga saman við heildini, og ikki minst: brúkar nógv orðabókina.

**Umbrótarin:** er ein, sum setir tekstin snøgt upp. Tað er hann, sum syrgir fyri, at allar upplýsingar eru við, sum skulu vera við. Persónsupplýsingar so sum: Navn á næmingi, skúli, lærugreinaheiti, navn á lærara. Ytra útsjóndin á stílinum: Yvirskrift við stórum stavum, Times New Roman skrift, reglufrástøðan skal hava 1,5 glopp, vinstri og høgri breddi skal vera beinur.

**Útgevarin:** er ein, sum kannar væl eftir, at tað, sum rithøvundurin, rættlesarin og umbrótarin hava gjørt, er væl úr hondum greitt, og tí er klárt at senda til ein lesara.

Í stílinum skalt tú hava sjálvstøðugar meiningar og grundgeva væl fyri tínum meiningum. Eisini skalt tú skipa evnið væl, og setningarnir skulu hanga saman, og brotini í stílinum skulu eisini hanga saman. Tú skalt vísa, at tú hevur skilt evnið væl og geva lesaranum eina góða uppliving.

# Yvirlit

**Áðrenn farið verður í gongd við at skriva sjálvan stílin, skalt tú gera tær hetta greitt:**

1. Hvørji krøv seta stílaevnini tær?
2. Hvat er tín stílur um?
3. Hvat hevur týdning fyri evnið, sum er í stílaevninum?
4. Hvussu skal innihaldið skipast?

**At gera tað lættari fyri teg at skriva stílin, er gott at:**

1. skriva stikkorð niður
2. gera hugarok.
3. gera eitt yvirlit, tað er, at tú velur tað, sum tú heldur hevur týdning fyri innihaldið.

**GEV GÆTUR!**

Yvirlitið er tínir persónligu minnislepar. Tað skal vera til hjálpar hjá tær, tá ið tú skrivar, tí at tað gevur tær eina ábending um, hvussu langt tú ert komin, og hvat tær manglar.

# Inngangur

Tú skalt brúka inngangin til at kveikja áhugan hjá lesaranum - tú skalt krøkja lesaran fastan í stílin við inngangin um - og samstundis skalt tú skriva ógvuliga skilliga í innganginum, hvat stílurin er um.

**Dømi um inngang:**

1. Sig, hvør tín persónliga tilgongd er til evnið.
2. Hevur tú eitt serligt endamál við at skriva júst henda stílin, so er gott at nevna tað.
3. Tú kann koma við einum páhaldi, sum tú roynir at greina í sjálvari viðgerðini.
4. Í innganginum kanst tú eisini greiða stutt frá einari hending ella eini støðu, og so greinar tú hetta í sjálvari viðgerðini.
5. Tú kanst finna fram, hvat høvuðsevnið er í stílinum, og lýsa hetta evnið í innganginum. Hetta er sera gott, tá ið tú greinar og tulkar eitt nú stuttsøgur og yrkingar.

**GEV GÆTUR!**

Í innganginum skalt tú nágreina innihaldið, gera greitt, hvussu mannagongdin er fyri stílin.

Tað kann vera hent at skriva inngangin seinast.

Inngangurin skal føra lesaran inn í sjálvt evnið, og tí skal hann hanga væl saman við sjálvari viðgerðini.

Ikki byrja stílin við: Eg havi valt at skriva ...

Sjálvandi hevur tú valt at skriva tað, sum tú skrivar. Títt navn stendur á stílinum.

# Sjálvur stílurin

Tú skalt alla tíðina halda teg til sjálvt evnið og hygg alla tíðina eftir yvirlitinum/hugarokinum, har tú hevur avmarkað evnið og evnisviðgerðina.

**Nøkur av høvuðskrøvunum til stílaskriving:**

1. Halt teg til høvuðsevnið
2. Být stílin sundur í brot, sum viðgera undirevni
3. Royn at skriva ítøkiligt
4. Syrg fyri, at teksturin er skilvísur (logiskur) og hongur saman.
5. Skriva eitt vanligt og frágreiðandi mál um tað, sum hevur almennan og persónligan áhuga. Brúka ikki styttingar og blóta ikki
6. Ikki brúka snildar orðingar, sum tú ikki skilir sjálv/ur
7. Ansa eftir, at tú fylgir og svarar uppgávuorðingini, og minst til, at tú gert eitt arbeiði, har onnur siga tær, hvussu og hvat tú skalt gera.

**GEV GÆTUR!**

Ein stílur er eitt bílagt arbeiði.

Halt teg til uppgávuorðingina.

Halt teg til evnið.

Být stílin sundur í partar.

Skriva so ítøkiligt sum gjørligt.

Ger tær greitt, at tað, tú hugsar um at skriva, í roynd og veru hevur týdning fyri tað, tú ynskir at greiða frá.

# Útgangur

Í útganginum kanst tú taka upp leysu endarnar ella taka saman um innihaldið.

**Dømi um útgangir:**

1. Inngangur og útgangur eiga at hanga saman.
2. Ein langur stílur, sum viðgerð nógv evni og nógvar trupulleikar, kann hava ein útgang, sum endurgevur tey brotini í stílinum, sum tú metir hava størstan týdning fyri stílin, og so at enda við eini niðurstøðu.
3. Um tú bara hevur brúkt meiningar hjá øðrum í stílinum, so er gott at enda við tínum egnu meiningum.
4. Um tú ikki kemur fram til eina niðurstøðu, skriva so tað, og skriva eisini, hví so er. Tá vísir útgangurin á trupulleikarnar, sum eru við at viðgera evnið, ella, at tað als ikki letur seg gera.
5. Um stílaevnið er um okkurt, sum manglar ella skeivleikar í samfelagnum ella aðra staðir, kanst tú enda við at koma við dømum, hvussu hetta kann verða rættað.
6. Ikki koma við nýggjum undirevnum í útganginum, men til ber at skriva, hvat ið fer at henda í framtíðini.